## Skerd toskaveiða í Eystursjónum



ES-nevndin er til reiðar við uppskoti sínum til kvotur í Eystursjónum komandi ár. Uppskotið ber í stuttum við sær, at toskakvotan í vestara partinum av Eystursjónum verður skorðin við 15 prosentum, meðan hon tilsvarandi hækkar 15 prosent í eystara partinum, skrivar heimasíðan 123.fo. Hetta kann hanga saman við, at ein í hinari vikuni boðaði frá nógvum smáfiski í Skagerakk og vestara partinum av Eystursjónum. Somikið nógv av smáfiski var, at formaðurin í Danmarks Fiskeriforening heitti á fiskimenn at verja henda smáfisk og flyta frá økjum, har nógvur smáfiskur var at fáa. Eisini segði hann seg vóna, at fiskimenn boðaðu frá til Danmarks Fiskeriforening, hvørji øki talan var um, skrivar Fiskeritidende.

# kipaeftirlitinum




*Sambært Skipalistanum er Topaz heilar 120 metrar langur og 19 metrar breiður. Hann er smíðaður í Týsklandi í 1988, hevur heimstað í Tórshavn, og útgerðarmaður er Bjarti Mohr. Tað er smápartafelagið Sp/f 4. September 1975, sum eigur skipið*

*Mynd: Skipalistin*

tað er so lítið, sum manningarfeløgini í Føroyum kunnu hjálpa fiskimonnunum umborð á Topaz við, men Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur mælt teimum til at seta seg í samband við føroyskan sakførara, sum síðan kann royna at loysa málið – og møguliga krevja arrest av skipinum, sum er hin drastiski vegurin at ganga.

- Hetta er eitt ógvuliga keðiligt mál, bæði fyri teir fiskimenn, sum eiga hýru til góðar og hjá reiðaranum, sum ikki hevur verið førur fyri at hildið sínar skyldur mótvegis manningini, sigur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

# Samtak velir at trúgva at Topaz-málið verður loyst

**- Eg tosaði við reiðaran í síðstu viku og haldi, at hann skal fáa arbeiðsfrið til at loysa málið. Vit velja at trúgva, at málið verður loyst í hesi vikuni, sigur Sonja Jógvansdóttir, samskipari á Samtak**

**TOPAZ**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at málið um manningina á verksmiðjutrolaranum Topaz, sum Bjarti Mohr eigur, er komið til Føroya Fiskimannafelag, er tað Samtak, sum FF er partur av, ið hevur tikið sær av samskiftinum við umboð fyri manning og reiðaran.

- Eg tosaði við reiðaran, Bjarta Mohr, í síðstu viku, og tá segði hann, at málið um manningarhýrur væntandi kundi loysast í hesi vikuni.

Sonja Jógvansdóttir, samskipari hjá Samtak, sigur seg hava álit á, at reiðarin fer at loysa málið, soleiðis sum hann hevur sagt.

- Tað er eisini umráðandi, at reiðarin fær arbeiðsfrið, og tí hava vit ikki tosað saman aftur enn.

Sonja sigur, at hon í morgun hevur tosað við ein av manningini umborð á Topaz, men hesin kundi bara siga, at enn er eingin hýra komin. Hetta var eitt stutt prát.

- Men tá Bjarti Mohr hevur sagt, at málið verður loyst í hesi vikuni, velja vit sum nevnt at trúgva honum og hava álit á, at hann loysir málið.

Hon vísir á, at Samtak fer einki at gera av sínum eintingum.

- Fiskimenninir eru ikki í føroyskum felag, men í feløgum í teirra heimlandi. Hinvegin er Topaz skrásettur undir føroyskum flaggi, og tí er skipið undir føroyskum lógum á økinum.

Sonja sigur, at tað í fyrsta lagið verður manningin sum ger av, um stig skulu takast – og hvørji hesi skulu vera, um tað vísir seg, at málið um hýruna ikki verður loystur samsvarandi avtaluni millum partarnar.

- Sum umboðandi Føroya Fiskimannafelag eru vit annars í holt við at kanna, hvørjar møguleikar manningin hevur, um tað skuldi víst seg, at málið dregur longur út.

Hon sigur, at tað mest drastiska stigið, sum hugsandi er, er at krevja arrest av skipinum og leggja sak móti reiðaranum.

- Vit kunnu bara lata teir vita, hvørjir møguleikar eru, men vóna samstundis, at málið verður loyst, soleiðis sum reiðarin segði í síðstu viku.

Sonja Jógvansdóttir sigur, at tað, sum manningin í fyrsta lagi ynskir, er at fáa sína hýru, soleiðis at teir kunnu halda fram við arbeiðnum umborð á Topaz.

- Samskiftið við manningina fellir ikki so lætt, tá málið er ein ávísur trupulleiki, og tað er skjótt, at misskiljingar kunnu stinga seg upp. Í práti við tann eina av manningini í morgun, avtalaðu vit at hava teldupost samband, sigur samskiparin á Samtak.